## Oljuprísurin rakar BP

Tann fellandi oljuprísurin á altjóða marknaðinum fær nú avleiðingar fyri bretska oljufelagið British Petroleum. Leiðslan kunngjørdi í gjár, at felagið hevði næstan 20 milliardir krónur í halli fjórða ársfjórðing í fjør samanborið við 25,7 milliardir krónur í avlopi í sama ársfjórðingi í 2007. Tony Hayward, forstjóri, sigur, at hallið kemst av tí fellandi oljuprísinum. Hann leggur afturat, at BP misti eisini fýra milliardir krónur orsakað av einari miseydnaðari verkætlan í Russlandi.

# Atlantic Supplybase: Fyrireikar seg til sjeyndu boringina



*Oljuútgerðarhavnin í Runavík ger klárt til sjeyndu boringina*



*Eli Lassen, stjóri og einasti, sum er til arbeiðis hjá Atlantic Supply Base alt árið.*

**Hóast langt er millum leitibrunnarnar á landgrunninum, so livir vónin hjá stjóranum í útgerðarhavnini í Runavík, Eli Lassen kortini, at tað skal fara at eydnast at finna olju, og tá tað hendir, kann einsta oljuútgerðarhavnin í landinum fáa alstóran týdning**

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Muller*
*Jan@sosialurin.fo*

Hóast tað helst fer at ganga umleið eitt hálvt ár, til klárt er at bora sjeynda brunnin á landgrunninum, so eru fyrireikingarnar byrjaðar av álvara í Føroya einastu oljuútgerðarhavn, Atlantic Supply Base í Runavík. Útgerðarhavnin liggur mest sum í dvala millum brunnarnar, sum verða boraðir á landgrunninum, og oftani eru ár ímillum teir. -Tað er tó umráðandi, at lív er í útgerðarhavnini, meðan bíðað verður til boringarnar sigur Eli Lassen, stjóri, sum er einsamallur á støðini. Men skjótt kemur veruligt lív í aftur, og tá verður arbeiði til eini fimtan fólk sigur Eli Lassen, sum í løtuni mest tekur sær av pappírsarbeiði, nú alt skal tilrættaleggjast frá minstu detalju. Teir hava longu fingið flestu rørini, sum skulu brúkast til at bora Anne Marie brunnin. Annað tilfar er eisini fingið til vega men nógv skal sampakka og verða klárt, tá hol verður sett á úti á landgrunninum.

Eli Lassen dámar væl arbeiðið, sum hann gongur uppí við lív og sál. Nú tað so smátt nærkast til sjeyndu boringina livir Eli mitt í verðini, og hann telist millum teirra, sum fegin síggja, at eitt rakstrarverdugt fund verður gjørt. Tí bert tá eru útlit til, at meira og støðugt virksemi fer at vera í útgerðarhavnini í Runavík. Ein útbygging av einum føroyskum oljufelti ber nevniliga í sær nógvar avmarkingar- og metingarbrunnar, og tá er veruliga brúk fyri havnini í Runavík.

Boripallurin West Phoenix, sum skal bora sjeynda brunnin á føroyska landgrunninum, er fyri kortum farin undir at bora djúpvatnsbrunn í norskum øki. Hesin brunnur er mettur at taka einar seks mánaðir og so eru Føroyar á skránni. Tvs. at vit kunnu vænta, at pallurin verður á føroyskum øki í juli ella august. Hinvegin - gongur væl at bora í Noregi - so kann talan eisini verða um fyrr enn tað.

Í næstum koma fólk frá fyristøðufelagnum ENI til Føroya at taka sær av ymsum fyrireikingum til komandi brunnin. Hetta er aðru ferð, at italska oljufelagið stendur á odda fyri eini oljuboring við Føroyar. Nógv er sjálvandi at síggja til undan eini slíkari boring, eitt nú skulu øll loyvi fáast uppá pláss, avtalur skulu gerast við føroyskar fyritøkur, um tær eru kappingarførar, um eitt nú tænastur sum proviantering, burturkast og aðrar veitingar.

## Atlantic Supply Base bjóðar seg fram hinumegin markið

Útlendsk oljufeløg, sum arbeiða tætt upp at føroyska markinum í bretskum øki, kunnu spara nógva tíð, orku og pengar við at brúka oljuútgerðarhavnina í Runavík heldur enn at skula fara inn í skotska havn. Eli Lassen, stjóri roynir hvat hann er mentur fyri at fáa feløgini at henda vegin.

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Muller*
*jan@sosialurin.fo*

**Nú nógv leitivirksemi vestan fyri Hetland nærkast føroyska markinum sær stjórin hjá Atlantic Supply Base, einastu føroysku útgerðarhavnini, Eli Lassen tað sum ein møguleika at skapa virksemi í Føroyum og fáa nýggjar inntøkur, at útlendsk oljufeløg, sum standa fyri leitingini við markið, venda eygunum henda vegin heldur enn móti Aberdeen og øðrum úgerðarhavnum í Skotlandi.**

**– Eg veit, at hetta er ein um ikki ómøgulig uppgáva so kortini sera torfør uppgáva, tí feløgini, sum arbeiða í bretskum øki eru von við at brúka útgerðarhavnirnar í Skotlandi. Tey vilja sjálvandi ikki fara frá tí trygga. Men tey eiga at vita, at tey kunnu spara nógvar pengar, tíð og orku, um tey heldur velja at brúka útgerðarhavnina í Runavík.**

**Eli Lassen sigur, at tað er so nógv styttri at brúka Føroyar. Um oljufeløg brúka Rúnavík heldur enn skotska havn, so spara tey 300 fjórðingar í sigling. So her er nógv at spara. Stjórin á Atlantic Supply Base fylgir annars gongdini í bretskum øki sera væl, og hann vónar, at eitt nú Chevron og Statoil fara at bora á landgrunninum í næstu framtíð.**